# Streymbrek oyðilegði eina rúgvu av húsarhaldstólum

ÓHAPP
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Eitt brek við streymveitingini hjá SEV oyðilegði hósmorgunin sera nógv húsarhaldstól í 25 húsum í Torkilsgøtu í Hoyvík.

SEV bað fríggjadagin húsaeigararnar í Torkilsgøtu um umbering fyri, at eitt brek við elveitingini oyðilegði teldur, sjónvørp, mikroovnar og onnur húsarhaldstól hósdagin.

Eitt mistak hjá SEV gjørdi, at spenningur kom á 0-leiðina til húsini, og brádliga kom alt ov nógv volt úr stikkkontaktunum í húsunum. Tað hevði við sær, at teldur og sjónvørp sprongdust, og at vaskimaskinur, mikroovnar og onnur tól fóru. Flestu tólini eru nú til umvælingar, og tey, ið ikki kunnu umvælast, verða endurgoldin.

SEV sigur í einum skrivi til húsarhaldini í Torkilsgøtu, at felagið harmast um tilburðin:

- Slík mistøk henda tíverri av og á, hóast vit hava kønar linjumenn, sum altíð royna at gera sítt besta til tess, at slíkar hendingar ikki koma fyri, skrivar SEV í skrivi til húsarhaldini.

SEV hevur eina ábyrgdartrygging, sum tekur við í førum sum hesum.

# Sjónvarpið sprongdist

Jan Falkenberg, sum býr í Torkilsgøtu nummar eitt, varð sjálvsagt skelkaður av hendingini. Í húsunum hjá honum og familjuni fóru vaskimaskinan, mikroovnurin, tvey sjónvørp, kassin til breiðbandið, hátalararnir til telduna, tráðleysu telefonirnar og vekjaraklokkan við útvarpi:

– Eg var til arbeiðis, tá brekið við streymveitingini fór fram. Sonurin ringdi alt fyri eitt til mín og segði óttafullur: 'Babba, sjónvarpið er eksploderað, og nógvur roykur kemur úr tí'. Eg skundaði mær sjálvandi niðan beinanvegin, men tá var tíbetur alt longu sløknað, sigur Jan Falkenberg og staðfestir, at brendaroykurin fylti alt húsið.

– Eg sløkti í stundini málaran og ringdi til SEV. Tá fekk eg at vita, at tað ikki bert var hjá okkum, at næstan øll húsarhaldstólini vóru oyðiløgd, sigur Jan Falkenberg, sum vónar, at hetta ikki fer at henda aftur:

– Vit vórðu sjálvandi øll skelkað av hendingini, men serliga varð yngri sonurin bangin og tordi ikki at vera inni fyrstu dagarnar.

**-horsdal**



*Jan Falkenberg roynir at fáa mikroovnin at rigga aftur, men ovnurin er steindeyður.*



*Her eigur sjónvarpið hjá eldra soninum at standa. Men tað sprongdist saman við øllum hinum húsarhaldstólunum. Nú er sjónvarpið farið til umvælingar, men Jan Falkenberg væntar ikki, at tey fara at síggja sjónvarpið aftur: – Tað kostar meira at umvæla tað, enn tað kostar at keypa eitt nýtt, sigur hann*



*Vaskimaskinan hjá familjuni Falkenberg stendur í løtuni úti í túninum. Hon er somuleiðis oyðiløgd av brekinum við streymveitingini hjá SEV*



*Hátalararnir til telduna standa á gólvinum og noyðast at fara við øllum hinum ruskinum niðan á Brennistøðina á Sandvíkahjalla*

## Kókipláturnar tendraðu av sær sjálvum

Í øllum teimum 25 húsunum í Torkilsgøtu fór okkurt húsarhaldstól. Ein kvinna greiðir soleiðis frá hendingini:

– Vit vóru úti á altanini, tá øll húsarhaldstólini sprongdust. Eg hoyrdi eitt øgiligt buldur og skundaði mær inn at vita, hvat var hent. Tað luktaði sera illa av brendaroyki frá vaskimaskinuni og uppvaskimaskinuna. Kókipláturnar á ovninum vóru farnar frá av sær sjálvum, og eymhettan gekk fyri, sigur ein kvinna, sum býr í Torkilsgøtu.

Kvinnan leggur afturat, at hon sjálvandi varð bangin av øllum hurlivasanum, men at hon skjótt sissaðist, tá hon frætti, at øll í grannalagnum vóru í somu støðu, sum hon:

– Eitt umboð frá SEV kom eisini heilt skjótt á gátt við einum brævi, har teir nágreiniliga greiddu frá, hvat var hent, sigur kvinnan og leggur dent á, at tað var gott, at hon var inni, tá húsarhaldstólini sprongdust:

– Eg var heppin. Ein veit ongantíð, hvat tað møguliga hevði kunnað endað við, sigur hon og leggur afturat, at tey skjótt fara at fáa nýggj tól frá SEV, og at hon til ta tíð noyðist at vaska við hond.

**-horsdal**